# ÁRSINS VITANARFRÓÐU

KAPPING 2021



## SPURDÓMUR: HVÍ BRESTA POPPKORN

# 3. flokkur í Sands skúla



Granskarar:

Arnbjørn Sjúrðason, Kristian Høgni Petersen, Rúni Vinjardsson Tungá, Hanus Bárðason, Jaspur Ørvarodd Hentze, Súsanna á Sondum Henriksen, Elisabet Havsteinsdóttir Klein

# INNGANGUR

Stutt um arbeiðið og frágreiðingina

Lærari:

Navn, teldupostur:

Lilian Clementsen

lilian.clementsen@skulin.fo

Luttakarar:

Nøvn á øllum

Arnbjørn Sjúrðason, Jaspur Ørvarodd Hentze, Súsanna á Sondun Henriksen, Hanus Bárðarson, Kristian Høgni Petersen, Rúni Vinjardson Tungá og Elisabet Havsteinsdóttir Klein

Vit loyva, at frágreiðingin verður løgd á gransking.fo, og
at tilfar úr henni kann verða nýtt til marknaðarføring

# INNIHALD


1. Hetta undrast vit á

2. Hví er tað so?

3. Legg eina ætlan

4. Savna upplýsingar

5. Hetta eru vit komin fram til

6. Sig øðrum frá

Fylgiskjøl

# 1. HETTA UNDRAST VIT Á

Vit skrivaðu spurningar, sum talvan bleiv full. Hon skrivaði tøl á spurningarnar so fingu vit ein seðil frá henni. So skrivaðu vit tølini á seðilin, so taldi hon tað saman, og so bleiv tað til: **Hví bresta poppkorn.**



# 2. HVÍ ER TAÐ SO?

Vit, allur flokkurin, prøvaðu at gita, hví poppkorn bresta. Og hesar hypotesur funnu vit:

- Olja fer í nøtina
- Hiti
- Tey niðastu hoppa upp til tey ovastu
- Tey bresta av olju
- Oljan blívur heit
- Salti ger at tey poppa



# 3. LEGG EINA ÆTLAN

## Poppkorn ætlan

Vit ætla at koyra bara korn í eina grýtu, og olju og korn í eina grýtu, smør og korn í eina grýtu og salt og korn í eina grýtu. Vit vilja vita hvussu stór tey blíva og hvussu leingi tað tekur.

Og so ætla vit at koyra korn í ovnin.  aftan á so koyra vit korn og olju í ovnin, Vit vilja vita um tað riggar at koyra í ovn. Og so gera vit akkurát tað sama men við mikroovn.



# 4. SAVNA UPPLÝSINGAR

1. Vit vita um poppkorni kann poppa uttan olju.Vit koyra kornið í eina reina grítu.Seta tað útá eina leysa kókiplátu.Tað brast ikki. Vit halda at plátan ikki riggaði nóg væl, grýtan var ikki serliga heit. Vit fara at prøva umaftur á komfýrinum inni í køk.




2. Vit fóru inn í køk, og tóku eina grýtu, og koyrdu korn í, men onki salt í. Tað byrjaði at poppa sirka ein minutt seinni. Men tey brendu meira enn vanlig poppkorn. Tey poppaðu ikki heilt.





3. Vit fóru inn í køk at gera royndina um salt gjørdi nakran mun. Vit koyrdu salt og korn í grýtuna. Poppkornið brendi og brustu ikki heilt.







4. Mikroovn: Vit prøvaðu við ongum salti og ongari olju, tað riggaði, men tey smakkaðu av ongum. So prøvaðu vit við olju,tað riggaði mega gott, tað smakkaði mega gott



Tey kornini vit brúktu olju til blivu størri, tí vit koyrdu akkurát líka nógv í báðu ferð

5. Ovn : Vit prøvaðu við bara korn, tað tók 19 minuttir til tað byrjaði at poppa, tað vóru bara nøkur fá sum poppaðu, men øll blivu brend innan í.



Vit prøvaðu við olju í, tað tók 16 minuttir til tað byrjaði at poppa, tað vóru bara nøkur fá, sum poppaðu. Tey við olju tey smakkaðu illa  tey blivu brend so nógv, at vit blivu so tyst.



Vit koyrdu smør og korn í eina grýtu, tað bleiv 111 gradir tá tað byrjaði at bresta. Tað smakkaði væl, tað riggaði væl.



Vit koyrdu korn og olju í eina grýtu, tað bleiv 130 gradir, tá tað byrjaði at bresta, tá tað endaði var tað uppi á 190 gradir. Tað riggaði best av øllum, sum vit hava prøva.





# 5. HETTA ERU VIT KOMIN FRAM TIL

Vit eru komin fram til at tað er hiti og olja, tí hitin hitar oljuna, sum kornini poppa. Tí tá vit prøvaðu poppkorn uttan olju og bara hita, tá bleiv tað ikki nóg heitt.

Tað riggar við korn og hita, men tað riggar ikki væl. Tí er tað best at brúka hita,olju og korn. Tað er tí at oljan verður heitari, sum tað verður betri fyri kornini at verða til poppkorn.

Tað riggar ikki at bara koyra korn og olju.

Tað riggar at brúka smør og korn og hita.

Tað riggar heldur ikki væl við bara salt og korn og hita.

Tað riggar heldur ikki væl at gera poppkorn í ovni. Hvørki við ella uttan olju.

Vit halda at poppkorn bresta av tí at hitin aktiverar nakað í korninum, sum ger at poppkorni brestur.

# 6. SIG ØÐRUM FRÁ

Vit hava  spurt  Betty, um vit kunnu fara at siga øllum børnunum frá, tí sum vit hava gjørt og lært. Og vit fara at gera tað tá vit hava morgunsang fríggjadagin.

Vit hava lært at gera PowerPoint í Nem í triðja, so vit fara at gera eina framløgu, sum vit vísa. (fylgiskjal 1)

Og vit fara eisini at gera poppkorn til øll

# FYLGISKJØL

1. PowerPoint at vísa fyri øllum skúlabørnunum.




# Hví bresta poppkorn???

Hesi eru gjørd  bara við hita og salt








Hesu eru gjørd í ovni.




Hesi eru gjørd í mikroovninum



Hesi eru gjørd við smør og olju

Poppkorn bresta av hita.
Tað riggar best at gera poppkorn við olju.
Olja blívur heitari enn smør, ella tá vit bara hava korn.